# FK-kappingin

**Hetta vikuskiftið skipaði Fleyr fyri FK-kapping hjá yngru leikarunum**

FLOGBÓLTUR

Vegna gó›u undirtøkuna, sum kappingin fekk, var› gjørt av, at byrjast skuldi longu fríggjadagin, solei›is at ta› skuldi ver›a gjørligt at avgrei›a kappingina til ásettu tí›ina.

Til samans vóru yvir 700 leikarar í kappingin, og kappa›ust hesir í 6 ymsum hallum.

Ni›anfyri ver›a myndir av vinnandi li›unum prent-a›ar.



TBa vann finaludystin í getnur 9 ár



SÍ vann kappingina hjá yngstu dreingjunum



Í kappingini hjá gentum 12 ár vann TB kappingina



Fleyr dreingirnir vunnu kappingina hjá dreingjum 12



TB er væl fyri á kvinnusí›uni, og vunnu tær eisini gentur 14



Sørvingar vunnu kappingina fyri dreingir 14



Kappingina hjá gentum 16 vann KÍF



Vinnarar av dreingir 16 gjørdust Fleyr



Eisini kappingina hjá kvinnuunglingum vann TB



Fleyr unglingarnir vunnu kappingina í sínum aldursbólki



VIÐMERKINGAR

# Musikkskúlin – illa fór hann

**Ólavur Hátún**

At almennu musikkskúlarnir, sum í seinnu helvt av 50-árunum tóku seg upp í Svøríki og nakað seinni í Danmark, skaptu eitt gróðrarlendi undir og eina av útbreiðslu av virkna tónleikalívinum sum ongantíð áður í norðurlendskari tónleikasøgu, eru øll tónlistafólk á einum máli um.

Í Føroyum varð hugskotið um slíka musikkskúlaskipan borið fram tíðliga í 60-árunum; men ikki fyrr enn smá 20 ár seinni slapst til verka við slíkum royndum her. Og væl vignaðist hjá Royndarmusikkskúlanum, sum, byrjandi í Tórshavn, Gøtu og Fuglafirði á heysti 1981, eftir fáum árum breiddi seg út um at kalla alt landið. Tey trð musikklærarastørvini, sum lagt varð fyri við, høvdu í 1985, tá musikkskúlar vórðu skipaðir sambært musikkskúlalógini frá árinum fyri, vaksið seg til ikki færri enn 24,5 størv, og so mikið varð strongt á eftir musikkskúlatímum úr øllum musikkskúlaøkjum, at læraratalið í 1989 var komið heilt upp á 44 størv. Hetta virksemið gav eisini úrslit, og sum besta dømi hevur áður verið borið fram, at Musikkskúlin í Vágum eftir hesum fáu árum fekk bygt upp eitt Ungdómsorkestur, sum var at meta sum tað fremsta í landinum, og sum eisini vann sær viðurkenning á ferðum uttanlands.

Men um hetta mundið var kreppualdan við at taka seg upp, og í musikkskúlaumsitingini varð tí sjálvboðið aftur farið niður um tey fjøruti størvini, um enn stavnhaldið var ein landsumfatandi musikkskúlaskipan við 50-60 lærarastørvum – frændur okkara fyri vestan hava 600 musikklærarastørv! – hýsandi øllum tónleikamennandi virksemi bæði til ljóð, rørslu og teoretiskar greinir og fatandi um aldursbólkar frá pinkubørnum og upp í búnan aldur.

Men tá ið vandi varnaðist fyri, at fíggjarliga støðið fór at verða tikið undan musikkskúlanum á landsjáttanini, komu allir landsins musikkskúlaleiðarar saman til fundar at viðgera viðurskiftini, og niðurstøðan gjørdist, at fór læraratalið niður um tey 35-37 størvini, fór musikkskúlin at koma í óføri við sínum aðalendamáli, sum er at skapa fyritreytir fyri virknum tónleikalívi um alt landið.

Vit fingu tá í lag eina ískoytisskipan, har kommunur sjálvbodnar rindaðu tað, sum restaði í til tey 35 størvini, og bjargaðu okkum á tann hátt undan beinleiðis kreppu. Tá ið ein komandi fíggjarlóg var undir viðgerð, kom eg sum táverandi musikkskúlaleiðari mær á tal við fíggjarnevndarformannin Jørgen Thomsen við teirri inniligu bøn, at musikkskúlajáttanin kundi verða hækkað við hálvari millión, sum kundi tryggja musikkskúlaskipanini um ikki fullgóð so tó framhaldandi livilig kor. Minnist, at tann heiðursmaður Jørgen Thomsen tá tók soleiðis til orða: »Er henda hálva milliónin so týðandi fyri tykkum, tá mugu vit siga, at hon »veltir onki less« hjá landinum.« Men tíverri møtti musikkskúlin ikki somu vælvild í nýggja landsstýrinum, og ikki bert varð noktað okkum at halda fram við okkara fyribils neyðloysn við ískoytisskipan, men eisini varð landsjáttanin skorin niður, og við ein brest datt musikkskúlavirksemið niðuraftur á *tað virksemisstøði, sum hann byrjaði við, og sum hann enn stendur á: 25 lærarastørv.* Musikkskúlin, sum áður var vónríkasti vøkstur í føroyskum mentanarlívi nakrantíð, hevur eftirsíðan lavað sum lamskotin fuglur úti um landið uttan nakran møguleika at spenna flog, so sum karmar eru til.

Í orð og tal hevur tað seinnu árini so hugaliga verið ásannað frá politiskari síðu, at mentanin meira enn nakað er lívgevandi mergurin í fólkinum. Vit hava eisini kunnað glett okkum um, at landsjáttanin til mentanarlívið í hesum skeiði er munandi økt. Men musikkskúlin hevur framhaldandi verið við sviðusoð. Fyri okkum mongu, sum við áhuga fylgja við, hvørja lagnu hesin týdningarmesti stovnur innan okkara tónleikalív fær, var tað skelkandi at hoyra í útvarpinum, at musikkskúlin heldur enn endiliga at fáa betri sømdir og rúmari ræsur nú aftur verður skerdur í landsfíggjarjáttanini. Hugsi ikki júst so nógv um tær fáu túsund krónurnar, sum talan er um, men meira um tað framhaldandi vantandi medvitið millum okkara politikarar um støðu musikkskúlans úti um landið og um tann samfelagsliga týdning, hann annars ber í sær, fær hann bert tey gróðrarlíkindi, sum hann hevur uppiborið.

# Politiskur vilji = tóm orð

**Pauli Einarsson**
*valevni Javnaðarfloksins*
Trongisvágur

Seinastu nógvu árini hevur nógv verið tosað um møguleikarnar fyri at fáa virksemi ígongd aftur runt í landinum. Tosið endar fyri tað mesta við einari samanlíkning ímillum Havnina og restina av Føroyum.

Havnin og tað sum liggur rundanum, verður í nútímans talu kamouflerað við orðinum Miðøkið. Hetta er bara ein roynd at spjaða Føroyar, sum fyrr var eitt samlað land, og skapa frontar ímillum oyggjar og bygdir.

Tíverri loypa landspolitikkarar á sama vognin við at taka undir við teimum lærdu ráðgevum, sum siga, at rákið ger, at alt skal samlast á einum stað, men tað er ikki rætt.

Tað hevur alla tíð verið so, at fólkið vil búgva so tætt saman sum gjørligt, tí tá er lættari at verja seg ímóti ymiskum vandum.

Í hesum framkomna landi er vandin ikki stríð við vápnum, men heldur innanoyggja stríð um, hvar virksemi skal vera. Um vit vilja hava eitt land, sum gevur møguleikar hjá fólki, eisini við góðari útbúgving, at støðast í teimum ymisku oyggjunum, mugu teir, sum valdir eru at stýra landinum, skjótt vísa hetta í verki.

Vit, sum búgva í Suðuroy, uppliva ferð eftir ferð, at tá vit vísa á onkran nýggjan møguleika fyri virksemi í oynni, so verður hetta uppskotið, av landsins politikkarum,samanlíknað við onnur øki í landinum, sum teir halda liggja betur fyri.

Tí tonki eg: Hvønn er tað betur fyri? Er tað fyri tey fáu útvaldu av teimum, sum búgva her í landinum, ta fremmandu vinnuna, sum kemur inn til Føroyar ella hesar báðar partar samlaðar?

Suðuroyggin liggur ikki verri fyri enn aðrar oyggjar í Føroyum. Tað er bara ein spurningur um, hvat ein samanlíknar við.

Vit, sum búgva í Suðuroy, krevja sama møguleika sum øll onnur í landinum, tí vit hava somu skyldur sum øll onnur, men vit merkja, at vit fáa ikki tað sama sum onnur, fyri skattapeningin, sum vit gjalda í Landskassan.

Fyri at taka eitt dømi, vil eg nevna ágangin frá restini av Føroyum, við landsins politikkarum á odda, ímóti at gera Drelnes á Tvøroyri til eina veitingarstøð til oljuvinnuna. Grundgevingar hava verið fleiri, so sum at øll skulu hava sama møguleika, vinnan skal sjálv skipa fyri hesum. Tann grovasta og seinasta grundgevingin fyri at myndugleikarnir ikki vildu vísa á Drelnes var, at myndugleikarnir kundu ikki geva einari danskari fyritøku einkarætt til veiting úr Føroyum. Myndugleikarnir vita fullvæl, at danska felagið, sum er við í ætlanini at gera Drelnes til veitingarstøð, er tann parturin av einum samtaki, sum kemur inn við nógvum royndum á økinum. Tað er í veruleikanum eitt føroyskt felag sum hevur nógv ár á baki á Tvøroyri, innan bæði reiðaravirksemi, handil og flutning, sum hevur fingið sær ein útlendskan samstarvsfelaga. Hesin samstarvsháttur er ikki annað enn tað, sum Oljumálastýrið hevur víst á sum ein rættur vegur hjá føroyskum fyritøkum, at koma inn í oljuvinnuna.

Tað eru fleiri onnur virki og feløg í Føroyum, sum hava fingið sær útlendskar samstarvsfelagar, so R. B. Thomsen er ikki nakað eindømi. Munurin er bara tann, at hinir búgva ikki í Suðuroy.

Eg dugi ikki at síggja, hvat, ið kann forða einum landstýrismanni at áleggja oljufeløgum, at brúka eina ávísa havn í Suðuroy, á sama hátt sum teir við lóg áleggja fiskimonnum, at selja ein ávísan part av veiðuni gjøgnum eina uppboðssølu norðanfjørðs. Hetta vildi ikki kostað Landskassanum eina einastu krónu, bara skapt størri møguleika fyri øðrum virksemi, og harvið betri trivnaði í Suðuroy.

# Havnin fingið tronga íløgujáttan



**Bent J. Hansen**
*Valevni á lista B*

Nú nærkast býráðsval, og valevnini royna eftir bestu evnum av lýsa síni hjartamál, ikki øll hugsa um at alt hetta kostar pening og at Tórshavnar kommuna hevur fingið eina sera tronga íløgujáttan frá Landsstýrinum, hetta eiga valevnini at hugsa um tá »lovað« verður.

Undirritaði, ið er valevni á lista B fer í nøkrum komandi greinum at lýsa nøkur mál, ið ikki eru valagn men trupulleikar, ið mugu loysast í komandi býráðssetu og sum undirritaði metir kunnu loysast uttan at íløgujáttan kommununar verður tyngd.

### Útstykkingaríbúðir

Útstykkingar skulu gerast í total-enterprisu t.v.s. at entreprenørur/byggisamtak keypir jørðina frá kommununi og í samstarvi við teknisku deild býráðsins, ger planlegging fyri økið, og ger tað byggibúgvið.

Entreprenørurin/byggi samtakið ger síðan lyklaklár hús í avtalaðum sniði á hetta økið, ið eru klár til brúkaran at keypa, hervið skal kommunan ikki í lumman eftir teim fáu íløgukrónunum, og økt ferð kann koma á íbúðarbyggingina í kommununi. Hetta vil geva kommununi størri frælsi til íløgur á skúlaøkinum, eldraøkinum og á barnaansingarøkinum, hetta vil undirritaði koma inn á í seinri grein.

### Barnaansingin

Nevndi í fyrstu grein míni møguleikan fyri at umganga íløgukarm landsstýrisins, fyri at røkka longri á íbúðarøkinum.

Hesin háttur kann eisini nýtast tá talan er um bygging av barnagørðum. Nú býráðið hevur tikið avgerð um at eingin nýggjur býlingur verður bygdur uttan barnagarð, skuldi verið lagamanni at latið byggiharran/samtakið, ið ger útstykkingina, eisini bygt barnagarðin og yvirtikið hann sum leigumál í X antal ár, ið inngongur sum keypspeningur, soleiðis kunnu vit fáa frístillað kapital til útbygging av barnarøktini í øðrum pørtum av býnum, og harvið fingið størri ferð á útbyggingina av barnaansingini.

# Eldrarøkt í nærumhvørvinum

**Tummas Eli Høj Joensen**
*Valevni til kommunuvalið í Sjóvar sókn*

Pensionistahúsið á Strondum er eitt talandi dømi um, at tey gomlu í kommununi hava víst stríðsvilja tá tað ráddi um at skapa karmar um teirra felagslív.

Men tá tað kemur til ansing av óhjálpnum pensionistum (á til dømis ellis- og umlættingarheimum), verða tey gomlu send langan veg av bygdini, fyri har at fáa hjálp.

Sum nútíðarsamfelagið er samansett, er neyðugt at gomul og óhjálpin fáa tilboð um røkt, og best er um henda hjálpin er at finna í nærumhvørvinum.

Tí eigur frá kommunalari síðu at verða miðað ímóti at útvegað verða umlættingarpláss eftir tørvi.